


# DÁTUEFTIRLITIÐ
# ÁRSFRÁGREIÐING 2006


CONNECT

# Innihald


| | | |
|---|---|---|
| 1. | Fororð | 3 |
| 2. | Dátueftirlitið, ráðið og skrivstovan | 5 |
| | 2.1 Játtanin á løgtingsfíggjarlógini | 6 |
| | 2.2 Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum | 7 |
| | 2.3 Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum | 7 |
| | 2.3.1 Eftirlit og heimildir | 7 |
| 3. | Virksemi í árinum 2006 | 9 |
| | 3.1 Hagtøl fyri 2006 | 10 |
| | 3.2 Loyvir og fráboðanir | 10 |
| | 3.3 KT-trygd | 11 |
| | 3.3.1 Trygdarkunngerðin | 11 |
| | 3.3.2 Verksetan av Trygdarkunngerðini | 12 |
| 4. | Ávís útvald mál í 2006 | 13 |
| | 4.1 Ymisk mál | 13 |
| | 4.1.1 Skráseting av telefonsamskifti | 13 |
| | 4.1.2 Skráseting av internetnýtslu | 13 |
| | 4.1.3 Revsiváttan | 14 |
| | 4.1.4 Persónstalið | 14 |
| | 4.1.5 Samtykki | 15 |
| | 4.2 Mál tikin upp av egnum ávum | 15 |
| | 4.2.1 Spýttroyndir á Fróðskaparsetri Føroya | 15 |
| | 4.2.2 Barnapornofiltur hjá Føroya Tele | 16 |
| | 4.3 Verkætlanir | 16 |
| | 4.3.1 Verkætlan – Forebyggelse af klamydia på Færøerne | 16 |
| | 4.3.2 Verkætlan – Kostur, umhvørvi og fruktbari | 17 |
| | 4.3.3 Verkætlan – Fyribyrging og heilsufremjan til føroyskar sjómenn | 17 |
| | 4.4 Ummæli av lógaruppskotum | 17 |
| 5. | Altjóða samstarv | 19 |
| | 5.1 Norðurlond | 19 |
| 6. | Eftirlitsvitjanir í 2006 | 21 |
| Skjal 1 | | 23 |
| Skjal 2 | | 25 |

Ársfrágreiðingin 2006 hjá Dátueftirlitinum
Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent

# 1 Fororð

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2006.

Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8, í persónsupplýsingarlógini og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2006, somuleiðis verða nøkur útvald mál lýst í ársfrágreiðingini.

Virksemið hetta árið hevur verið nógv merkt av arbeiðinum við kt-trygd. Tann 1. september 2006 fór freistin til at lúka krøvini í Trygdarkunngerðini og Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi svarað nógvum munnligum fyrispurningum um kt-trygd og hevur annars kunnað og vegleitt alsamt fleiri privatfólki, vinnulívi og almennum stovnum í mun til undanfarna ár.

Dátueftirlitið hevur fingið gott samstarv við dátueftirlitini í hinum norðurlondunum og luttekur árliga á felags norðurlendskum málsviðgerarfundi. Í 2006 var hesin fundur hildin í Helsingfors.

Dátueftirlitið tók í 2005 stig til, at ES skal viðgera og góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. ES nevndin setti ein granskingarbólk at kanna, um Føroyar lúka treytirnar fyri at fáa eina tílíka góðkenning, og í 2006 hevur eitt ávíst arbeiði verið við at svara spurningum og senda ymiskt tilfar til granskingarbólkin.

Arbeiðið í 2006 hevur verið merkt av, at onki starvsfólk hevur verið í føstum starvi helvtina av árinum, og hetta hevur havt við sær at fleiri uppgávur ikki hava verið røktar.

Tórshavn, desember 2007

Turið Debes Hentze
Forkvinna í Dáturáðnum

Ingunn Eiriksdóttir
Stjóri í Dátueftirlitinum

# 2 Dátueftirlitið, ráðið og skrivstovan

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sum er skipaður undir Innlendismálaráðnum. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Innlendismálaráðið, men er í virksemi sínum óheft av Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum sambært lógini eru fyrisitingarliga endaligar.

Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, valt av landsstýrismanninum í innlendismálum, og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár, og heimild er í lógini at velja eykalimir, men henda heimild hevur ikki verið brúkt higartil.

LIMIRNIR Í DÁTURÁÐNUM
PR. 31. DESEMBER 2006:
Turið Debes Hentze, advokatur, forkvinna
Bjarni Wilhelm, fyrisitingarleiðari
Óli Hansen, løgfrøðingur

SKRIVSTOVAN:
Í 2006 starvaðust 2 løgfrøðingar á Dátueftirlitinum. Frá 31. august 2006 og árið út var onki starvsfólk í føstum starvi á Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið fekk í 2006 egin skrivstovuhølir, adressan er Reyngøta 33, Tinganes.

2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2006 var: **kr. 1.262.000 kr.**

Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri øll árini, ið Dátueftirlitið hevur virkað.

FÍGGJARJÁTTANIN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM FYRI 2002-2006

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| | **J + EYJ** | **J** | **J** | **J** | **J+EYJ** |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **987** | **1.006** | **912** | **912** | **1.262** |
| Lønir o.a. | 643 | 662 | 650 | 694 | 1.000 |
| Keyp av vørum og tænastum | 160 | 160 | 126 | 126 | 126 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 148 | 148 | 100 | 74 | 100 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 36 | 36 | 36 | 18 | 36 |

2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ
HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2006 vóru hesar reglur galdandi:**
Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).

Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).

Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.

Kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.

Kunngerð nr. 30 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið.

Kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið.

Kunngerð nr. 32 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið.

Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 27. august 2002.

2.3. UPPGÁVURNAR HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM
Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

2.3.1. EFTIRLIT OG HEIMILDIR
Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

# 3 Virksemi í árinum 2006

Dátueftirlitið hevur í 2006 havt hesar viðgerðir:

- Vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privat persónum
- Viðgjørt klagur frá persónum um ymiska viðgerð av persónsupplýsingum
- Ummælt nýggja lóggávu
- Viðgjørt fráboðanir
- Viðgjørt loyvir
- Tikið mál upp av egnum ávum
- Svarað fyrispurningum innan KT-trygd.
- Luttikið í norðurlendskum samstarvi
- Harumframt hevur Dátueftirlitið nýtt nógva orku uppá fráboðanina í sambandi við Talgildu heilsuskipanina hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum, hereftir nevnd THS.
- Eisini hevur eitt sindur av arbeiði staðist av at samskifta við granskingarbólkin, sum ES nevndin hevur sett at kanna, um Føroyar lúka treytirnar fyri at fáa eina triðjalandsgóðkenning.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og fjøltáttaðar. Málsviðgerðin í Dátueftirlitinum fevnir m.a. um munnliga og skrivliga vegleiðing, so virkað verður fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði. Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar kunnu m.a. verða um, hvørt upplýsingar kunnu metast sum viðkvæmar, og um ávísar viðgerðir av persónsupplýsingum kunnu metast at fylgja reglunum í persónsupplýsingarlógini. Í 2006 hava fyrispurningar eisini verið um treytir og aldur fyri samtykki, telefonskráseting, striking og burturbeining av persónsupplýsingum, sum eru skrásettar á leitimaskinuni www.google.com og nógvir fyrispurningar hava eisini hetta árið verið um p-talið.

Dátueftirlitið hevur í 2006 brúkt nógva orku uppá kunning um fráboðanarskyldu sambært § 32 í lógini.

## KUNNING

Dátueftirlitið leggur kunnandi tilfar á heimasíðuna www.datueftirlitid.fo. Kunngerðir, vegleiðingar, tíðindi, orðabók og oyðubløð liggja eisini á heimasíðuni. Oyðubløð, sum skulu útfyllast, tá t.d. viðkvæmar persónsupplýsingar skulu viðgerast ella skulu flytast av landinum, kunnu útfyllast á heimasíðuni og sendast aftur til Dátueftirlitið elektroniskt. Um teldutøka oyðiblaðið verður brúkt skal ein váttan við undirskrift sendast Dátueftirlitinum við vanligum posti.

Somuleiðis liggur ein listi yvir givin loyvir og fráboðanir á heimasíðuni.

## 3.1. HAGTØL FYRI 2006

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í skjalaskránni hjá Dátueftirlitinum fyri 2006, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2006.

Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember 2006 vóru 86 nýggj mál skrásett.

Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Fráboðanir og givin loyvir | 15 |
| Norðurlendskt og Altjóða samstarv | 5 |
| Fyrispurningar frá almennum myndugleikum og privatum | 16 |
| Lógaruppskot til hoyringar | 2 |
| Mál tikin upp av egnum ávum | 3 |
| Mál viðvíkjandi Kt-trygd | 5 |
| Innanhýsis mál | 10 |
| Onnur mál | 30 |

## 3.2. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

### Hvat er eitt viðgerðarloyvi

Eitt viðgerðarloyvi er loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, e.a. hevur loyvi at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Dátueftirlitið avger um loyvi kann gevast og ásetir treytir fyri loyvinum.

### Loyvi krevst

Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga, ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

### Viðgerð, sum loyvi ikki krevst til

Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi er ásett, at ymiskar viðgerðir eru undantiknar kravinum um viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta er m.a. ein partur av viðgerðini sum advokatar

og grannskoðarar gera um egin viðskiftafólk, somuleiðis er partur av viðgerð sum læknar, sjúkrarøktafrøðingar, tannlæknar, kliniskir tann-tøkningar, apotekarar og aðrir persónar við løggilding til at útinna virksemi innan heilsu- og sjúkrarøkt gera, undantikin kravinum um loyvi. Tá almennir myndugleikar viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar og viðgerðin hevur heimild í lóg, er viðgerðin somuleiðis undantikin kravinum um viðgerðarloyvi.

**Fráboðanir**

Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum høvuðsregla fráboðast Dátueftirlitinum.

**Hvat er ein fráboðan**

Ein fráboðan er ein frágreiðing til Dátueftirlitið um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum.

Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar, áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Dátueftirlitið ger av, um fráboðanin er fullgóð.

**Viðgerð sum ikki skal fráboðast**

Tríggjar kunngerðir eru gjørdar við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum ikki eru viðkvæmar, verða viðgjørdar, skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum.

## 3.3. KT-TRYGD

Ein meginregla í dátuverndarrættinum er trygdarkravið. Hetta merkir í høvuðsheitum, at bert góðkendir persónar skulu hava atgongd til góðkend endamál.

### 3.3.1. TRYGDARKUNNGERÐIN

Reglur eru um kt-trygd í § 31 í persónsupplýsingarlógini, og í 2003 varð kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum lýst. Kunngerðin verður vanliga nevnd Trygdarkunngerðin og í kunngerðini eru nágreiniligar ásetingar um kt-trygd.

Reglurnar áseta í høvuðsheitum, at dátuábyrgdarar skulu skipa fyri innaneftirliti og seta krøv til veitarar og onnur, sum upplýsingar verða latnar til.

Reglurnar um kt-trygd verða vanliga bólkaðar í 3 høvuðsbólkar

- Fysisk trygd
- Elektronisk trygd
- Fyriskipanarlig trygd

**Fysisk trygd**

Hetta eru reglur um tað fysiska umhvørvið, reglur sum skulu forða fyri at óviðkomandi fáa atgongd, t.d. reglur um at læsa hurðar, at gestir verða vístir upp á pláss, at printarar og annað ikki standa við útgongdina, tryggjan móti eldi o.a.

**Elektronisk trygd**

Hetta eru reglur um trygdina í skipanini, t.d. virusverja, loyniorð, firewall, brongling, og tryggjan móti hackarum o.a.

**Fyriskipanarlig trygd**

Hetta eru reglur og mannagongdir um, hvørjir persónar skulu hava atgongd til hvørjar upplýsingar v.m.

**Freistin farin**

Freistin at lúka krøvini í Trygdarkunngerðini var úti 1. september 2004, men Dátueftirlititð kundi í serligum føri geva loyvi til eina longri tillagingartíð tó í mesta lagi 2 ár, og var henda freist úti 1. september 2006.

Hetta merkir, at øll upplýsingakervi (informationssystemer) skulu halda treytirnar í Trygdarkunngerðini, og at tað er leiðslan hjá dátuábyrgdaranum, sum hevur ábyrgdina av, at reglurnar í trygdarkunngerðini verða fylgdar, og at starvsfólkini fáa upplæring, kunning og vegleiðing í trygdarreglunum.

3.3.2. VERKSETAN AV TRYGDARKUNNGERÐINI

Reglur um kt-trygd snúgva seg í stóran mun um at seta mál, skjalfesta og eftirmeta. Vanliga verður sagt, at 80% av krøvunum í kt-trygdarskipanum eru fyriskipanarlig, meðan 20% av krøvunum eru teknisk.

Tá krøvini í Trygdarkunngerðini skulu setast í verk, kunnu skjølini, sum eru neyðug at gera í hesum sambandi bólkast í tríggjar høvuðsbólkar:

- Stýrandi skjøl
- Gjøgnumførandi skjøl
- Eftirlitsskjøl

**Stýrandi skjøl**

Hetta eru skjøl sum lýsa skipanina, sum áseta mál, politikk, krøv og skyldur, ábyrgd og myndugleika.

**Gjøgnumførandi skjøl**

Hetta eru skjøl sum lýsa mannagongdir t.d. leiðbeiningar og vegleiðingar.

**Eftirlitsskjøl**

Hetta eru skjøl, sum hava til endamáls at staðfesta, um hendingar hava verið í samsvari við ásettar mannagongdir og leiðbeinandi reglur. Nevnast kann t.d. frágreiðingar, tjekklistar og logglistar v.m.

# 4. Ávís útvald mál í 2006

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verður greitt nærri frá ávísum útvaldum málum í 2006.

## 4.1. YMISK MÁL

### 4.1.1. SKRÁSETING AV TELEFONSAMSKIFTI

Í § 15 í persónsupplýsingarlógini eru serligar reglur um í hvønn mun og undir hvørjum treytum arbeiðsgevarar kunnu skráseta telefonsamskifti hjá starvsfólki.

Greinin fevnir bert um sjálvvirkandi skráseting og forðar sostatt ikki fyri manuellari skráseting. Loyvt er at skráseta talið av samrøðum og hvussu nógv talutíð verður brúkt. Somuleiðis er loyvt sjálvvirkandi at skráseta soleiðis, at trý tey seinastu siffrini í telefonnummarinum ikki verða upplýst. Tað, sum ikki er loyvt at skráseta sjálvvirkandi, t.e. uttan loyvi frá Dátueftirlititnum, eru øll siffrini í nummarinum, ið ringt verður til.

Dátueftirlitið fær regluliga fyrispurningar um telefonskráseting, og hevur í 2006 merkt ein ávísan vøkstur í fyrispurningum um, í hvønn mun arbeiðsgevarar kunnu kanna telefonnýtsluna hjá starvsfólkunum. Í 2006 var bara ein av umsóknunum um loyvi at fáa útgreinaða telefonrokning gingin á møti. Í hesum ítøkiliga málinum skuldu upplýsingarnar nýtast í sambandi við eitt rættarmál.

### 4.1.2. SKRÁSETING AV INTERNETNÝTSLU

Í 2006 eru nakrir fyrispurningar komnir frá privatum fyritøkum um, hvørjar reglur eru galdandi um arbeiðsgevari ynskir at halda eyga við, hvar arbeiðstakarin ferðast á internetinum.

Dátueftirlitið hevur í 2006 merkt ein øktan áhuga fyri hesum spurningum, og hevur í hesum sambandi lagt ymiskt kunnandi tilfar um hetta evnið á heimasíðuna.

Rættarstøðan er í høvuðsheitum hendan:

**Eftirlit við starvsfólki á internetinum**

Øll upplýsingarkervi skráseta sjálvvirkandi, hvør loggar seg inn og hvør loggar seg út. Arbeiðsgevarin hevur skyldu til at logga allar rørslur í upplýsingarkervinum, sum hava týdning fyri upplýsingartrygdina. Loggingin er harumframt neyðug fyri, at kervið skal virka. Serliga ber hetta í sær eina skyldu at logga nýtslu hjá skrásettum og royndir hjá óskrásettum at nýta kervið.

Dátueftirlitið mælir til, at arbeiðspláss hava reglur fyri at nýta upplýsingarkervið. Starvsfólkini eiga at verða kunnað um hesar reglur og avleiðingarnar av at bróta tær. Tað er ikki uppgávan hjá Dátueftirlitinum at gera av, hvørjar fylgjur brot á tílíkar reglur eiga at fáa fyri starvsfólkini.

Um arbeiðsgevarin gerst varugur við, at upplýsingarkervið verður misnýtt, kann hann geva boð um, at eftirlit verður framt við, hvør misnýtir upplýsingarkervið, um hetta ikki heldur uppat innan eina ávísa freist. Um misnýtslan ikki er hildin uppat innan givnu freistina, kann arbeiðsgevarin uttan loyvi frá starvsfólkunum, gjøgnum loggin finna út av, hvør stendur aftanfyri. Í tílíkum føri er tað ein fyritreyt, at boðini/kunningin frá arbeiðsgevaranum eru komin til starvsfólkini í góðari tíð og persónsverndin hjá starvsfólkunum kemur tá at viga minni enn grundaði áhugin hjá arbeiðsgevaranum í eftirlitinum. Upplýsingarnar, sum koma fram, kunnu møguliga verða brúktar móti starvsfólkunum t.d. í einum arbeiðsrættarmáli. Í tílíkum førum eru aðrar reglur galdandi enn persónsupplýsingarlógin.

Um loggurin bendir á revsiverd viðurskifti, t.d. róður á alnótini eftir barnaporno, skal løgreglan altíð verða varskógvað. Arbeiðsgevarin kann ikki av sínum eintingum kanna, hvussu nógva tíð hvør einstakur brúkar á alnótini, ella hvørjar síður verða vitjaðar.

**Teldupostar og fílar hjá starvsfólkum**

Arbeiðsgevarin hevur sum meginreglu ikki rætt til at lesa privatan teldupost og fílar (t.d. føðingardagsheilsanir, privat brøv ella tílíkt), hóast hetta liggur á teldukervinum hjá arbeiðsgevaranum.

Tá talan er um at lesa teldupostar og fílar, sum hava samband við arbeiðið (brøv, fyrispurningar, bíleggingar o.t.), hevur arbeiðsgevarin í nøkrum førum rætt til at kanna hesar, eisini tá teldupostarnir og fílarnir liggja á telduni ella í postkassanum hjá starvsfólkunum. Í hvørjum førum og eftir hvørjum treytum hetta ber til, má metast um í hvørjum einstøkum føri við atliti at reglunum í § 9, stk. 1, nr. 6.

### 4.1.3. REVSIVÁTTAN

Dátueftirlitið viðgjørdi í 2006 eina áheitan frá einum privatum felag um at krevja revsiváttan frá teimum fólkum, sum skuldu manna nevndirnar í felagnum. Dátueftirlitið vísti í svarinum á, at slíkar upplýsingar verða bólkaðar sum viðkvæmar persónsupplýsingar sambært § 2, nr. 9 í persónsupplýsingarlógini og tí krevst viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum til hesa viðgerð.

### 4.1.4. PERSÓNSTALIÐ

Eins og árini frammanundan hevur Dátueftirlitið í 2006 fingið fleiri fyrispurningar um nýtslu av p-talinum. Tað tykist sum um hetta framhaldandi er ein spurningur, sum hevur stóran áhuga, hóast reglurnar í persónsupplýsingarlógini eru sera greiðar á hesum øki.

#### 4.1.5. SAMTYKKI

Eisini hava nógvir fyrispurningar í 2006 verið um reglurnar fyri lógligum samtykki. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi vegleitt um treytirnar, sum eru, at tað skal vera eitt sjálvboðið, nágreiniligt og kunnað viljaboð frá skrásetta sjálvum. Hetta merkir í høvuðsheitum at, fyri at eitt samtykki er gildugt sambært persónsupplýsingarlógini krevst, at tað er givið frá skrásetta sjálvum ella frá einum persóni, sum hevur fulltrú frá skrásetta, og at tað ikki á nakran hátt skal vera givið undir tvingsli.
At samykkið skal vera kunnað merkir, at tann samtykkjandi skal hava fingið so mikið av upplýsingum, at viðkomandi er vitandi um, hvat samtykkið fevnir um og um fylgjurnar av tí.

At samtykkið skal vera nágreiniligt merkir, at ongin ivi skal vera um, at samtykkið er givið, hvørjum dátuábyrgdara samtykkið er givið, og til hvørjar viðgerðir samtykkið er givið.

Eingi formkrøv eru til samtykki, sum tí bæði kann vera givið munnligt, skrivligt, elektroniskt ella á annan hátt. Tað er dátuábyrgdarin sum hevur próvbyrðuna fyri lógligum samtykki, og eigur tí helst at tryggja sær eitt skrivligt samtykki.

### 4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

#### 4.2.1. SPÝTTROYNDIR Á FRÓSKAPARSETRI FØROYA

Eitt mál, sum Dátueftirlitið hevur tikið upp av egnum ávum og nýtt nógva orku uppá í 2006 er eitt mál um flutning av viðkvæmum persónsupplýsingum av landinum uttan neyðugt viðgerðarloyvi.

Dátueftirlitið frætti síðst í 2005 gjøgnum fjølmiðlarnar, at ein lívfrøðingur, sum starvaðist á Fróskaparsetri Føroya, uttan neyðugt viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum hevði flutt spýttroyndir hjá 180 dreingjum til USA at nýta í sambandi við granskingarverkætlan.

Dátueftirlitið tók málið upp, og av tí at málið var mett at vera sera álvarsligt og prinsipielt varð málið viðgjørt saman við Dáturáðnum. Í hesum sambandi snúði tað seg um, at viðkvæmar persónsupplýsingar vóru fluttar av landinum uttan neyðugt viðgerðloyvi.

Eftir nógv fundarvirksemi og samskifti millum Dátueftirlitið og Fróskaparsetrið var niðurstøðan, at Fróskaparsetrið, eftir at ymiskar treytir vóru settar, fekk eftirfylgjandi loyvi til granskingarverkætlanina og at flyta viðkvæmar upplýsingar av landinum í hesum sambandi.

4.2.2. BARNAPORNOFILTUR HJÁ FØROYA TELE

Eitt annað mál sum Dátueftirlitið tók upp av egnum ávum, var málið um barnapornofiltrið hjá Føroya Tele. Hetta var somuleiðis eitt mál, sum Dátueftirlitið frætti um gjøgnum fjølmiðlarnar. Eftir at málið hevði verið umrøtt í fjølmiðlunum fyrst í januar mánað í 2006, setti Dátueftirlitið seg í samband við Føroya Tele fyri at fáa nærri frágreiðing um, hvussu hetta barnapornofiltrið virkaði í praksis, og um samstarvið millum Føroya Tele og ríkisløgregluovastan í hesum sambandi.

Eftir ávíst fundarvirksemi og nógv brævasamskifti millum Dátueftirlitið og Føroya Tele, gjørdi Dátueftirlitið av ikki at gera meira við málið. Í hesum sambandi varð serliga dentur lagdur á frágreiðing frá Føroya Tele har greitt var frá, hvussu filtrið virkaði, og hvørjar skrásetingar vóru gjørdar í hesum sambandi.

Føroya Tele legði serligan dent á hesi viðurskifti:

- Føroya Tele skrásetur ikki persónsupplýsingar í sambandi við barnaporno
- Bert uppteljing av vitjanarroyndum til barnapornografiskar síður verður framd
- Bert tal av royndum fyri ávíst samdøgur verður latið ríkisløgregluni
- Hvørki ríkisløgreglan ella nakar annar fær fráboðan um, hvør ið roynir at vitja barnapornografiskar heimasíður

4.3. VERKÆTLANIR

Dátueftirlitið hevur í 2006 givið loyvi til 6 ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. hesar verða nevndar:

4.3.1. VERKÆTLAN:
**Forebyggelse af klamyndia på Færøerne**

Dátuábyrgdari:
Malan Egholm

Endamál:
At undersøge hvilken forebyggende indsats der udøves, og hvordan unge forholder sig til indsatsen. Det overordnede formål er at få sat fokus på forebyggelse af klamydia og identificere supplerende tiltag, som kan fremme forebyggelsen.

Háttur:
Samrøður við heilsusystrar, lærarar, kommunulækna í Havn og í Fuglafirði, umframt landslæknan. Bólkasamrøður (fokusgruppeinterviews) verða gjørdar við útvaldar gentur og dreingir í aldrinum 19-20 ár úr Handilsskúlanum í Havn á Kambsdali og í Fuglafirði

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið tann 12. november 2006 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 1. mai 2007.

4.3.2. VERKÆTLAN:
**Kostur, umhvørvi og fruktbari**

Dátuábyrgdari:
Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, Pál Weihe

Endamál:
At kanna sambandið millum kost, umhvørvi og fruktbari.

Háttur:
Blóðroyndir, landroyndir og sáðroyndir av monnum í aldrinum 20-25 ár.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið tann 11. januar 2007. Loyvið er galdandi til 31. desember 2010 og hevur ávísar treytir.

4.3.3. VERKÆTLAN:
**Fyribyrging og heilsufremjan til føroyskar sjómenn**

Dátuábyrgdari:
Majken Olsen

Endamál:
Fyribyrging og heilsufremjan til føroyskar sjómenn

Háttur:
Samrøðukanning við útvaldar sjómenn.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið tann 2. mai 2006 við ávísum treytum.

Dátueftirlitið hevur í 2006 viðgjørt fleiri aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at kanningin er navnloynd, og at loyvi frá Dátueftirlitinum tískil ikki krevst.

4.4. UMMÆLI AV LÓGARUPPSKOTUM
Dátueftirlitið hevur í 2006 ummælt hesi lógaruppskot:

1. **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll**
   Uppskotið snúði seg í høvuðsheitum um at loyva tollvaldinum elektroniska terminalatgongd til upplýsingar um ferðandi hjá flutningsfeløgum.

2. **Uppskot til lóg um fólkayvirlit**
   Uppskotið byggir í høvuðsheitum á donsku lógina um Det centrale Personregister (CPR)

# 5. Altjóða samstarv

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning og er neyðugt, orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES fyriskipan 95/46EF frá 24.10.1995 um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari vælveru hjá tí einstaka og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu frítt flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig . Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES londini gera og á heimasíðuni hjá ES nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond.

Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES lond og tey londini, sum ES nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Somuleiðis søkti Innlendismálaráðið í 2005 ES nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland.

## 5.1. NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram millum dátueftirlitini í Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi og Svøríki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum.

Dátueftirlitið hevur síðan 2005 luttikið á árligu málsviðgerarfundunum millum norðurlendsku dátueftirlitini. Á hesum fundum eru framløgur um ymisk evni t.d. møguleikar við nýggjari tøkni, greitt verður frá týdningarmiklum málum í farna árinum, londini greiða frá ymiskum nýggjum trupulleikum, sum stinga seg upp og høvi er at fáa ymiskar spurningar á skrá til kjak.

Á árliga norðurlendska málsviðgerarfundinum, sum í 2006 varð hildin í Helsingfors luttók umboð fyri Dátueftirlitið. Á fundinum vóru ymisk áhugaverd evni viðgjørd, m.a. vaktarhald við vakmyndatóli, ymiskt

eftirlit av starvsfólkum t.d. eftirlit við telefonnýtslu og rúsdrekkatestir. Eisini var umrøtt hvønn leiklut eftirlitsmyndugleikarnir hava í mun til „spam“, og spurningurin um innlit í „logg“ listar var umrøddur.

Dátueftirlitið metir, at tað hevur stóran týdning at luttaka á hesum fundum, og at vit kunnu læra nógv av londunum rundanum okkum. Londini hava havt lóggávu á hesum økinum longri enn vit hava í Føroyum, og tey kenna tí oftast teir trupulleikar vit stríðast við, og kunnu vísa á ymiskar loysnir, sum tey hava nýtt.

# 6. Eftirlitsvitjanir í 2006

Dátueftirlitið hevði hvørki fíggjar- ella starvsfólkaorku til at fara á eftirlitsvitjanir í 2006.

# Skjal 1: Reglugerð fyri Dátueftirlitið

Sambært løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum § 36 stk. 4 verður ásett:

§ 1.

Stk. 1. Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu. Ráðið telur 3 limir, formannin, sum er løgfrøðingur, og tveir limir afturat. Limirnir verða valdir fyri 4 ár. Knýtt at ráðnum er avgreiðsluskrivstovan við stjóra og øðrum starvsfólki.

Stk. 2. Fíggjarligu viðurskiftini hjá Dátueftirlitinum verða avgreidd samsvarandi roknskaparreglugerð, sum Dáturáðið hevur samtykt.

§ 2.

Ráðið viðger og tekur avgerð um:

Mál av serligum týdningi (prinsippmál)
Mál av stórum almennum áhuga, ella sum fáa stórt árin á alment ella privat virksemi o.a.
Mál, sum eru ivingarsom
Mál, sum ráðslimur ynskir, at ráðið viðger
Mál, sum av øðrum orsøkum eiga at avgerast av ráðnum

Stk. 2. Onnur mál verða viðgjørd og avgjørd av skrivstovuni.

Stk. 3. Mál, sum fevnd eru av stk. 1 pkt. 1-5, og sum ikki tola at bíða til ráðsfundur verður, verða avgjørd av skrivstovuni í samráð við nevndarleiðaran, men skulu skjótast gjørligt leggjast fyri ráðið.

§ 3

Ráðið ásetir, nær fundur skal vera, og verður fundur annars, tá ið formaðurin heldur tørv vera á tí, ella um tveir limir biðja um fund.

Stk. 2. Ráðsformaðurin fyrireikar í samstarvi við skrivstovuna tey mál, sum viðgerast skulu á ráðsfundum og leiðir fundirnar. Skrivstovan fyrireikar fundirnar, gevur fundarboð við dagsskrá og viðleggur neyðug skjøl.

Stk. 3. Berst formanninum frá at møta á fundi, velur ráðið millum limir sínar ein næstformann.

Stk. 4. Skrivstovustjórin og eisini onnur á skrivstovuni kunnu eftir avgerð stjórans luttaka á ráðsfundum.

Stk. 5. Um limi ikki ber til at møta á fundi í longri tíð, kann formaðurin heita á landsstýrismannin, um at velja eykalim í staðin fyri viðkomandi.

§ 4

Fundurin er viðtøkuførur, tá ið formaðurin ella næstformaðurin og ein limur afturat eru á fundi. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða leiðarans avgerandi.

Stk. 2. Ráðið kann boðsenda serkønum, tá hetta verður hildið neyðugt til málsviðgerðina, eins og onnur, sum hava serligan áhuga í einum máli, kunnu fáa høvi at møta á fundi og geva frágreiðing til tess at lýsa málið betur.

Stk. 3. Eftir fundin verður fundarfrásøgn gjørd, sum verður góðkend á næsta fundi. Er atkvøtt, skal greiðast frá hesum. Ein minniluti kann krevja sína áskoðan tilskilaða.

Stk. 4. Frásagnir frá ráðsfundum eru ikki alment atgongdar.

§ 5

Ráðslimur kann ikki luttaka í avgerð ella viðgerð av einum máli, sum viðkomandi hevur persónlig áhugamál í, ella um viðurskifti fyriliggja, ið kunnu sáa iva um uttanveltaðu støðuna hjá viðkomandi.

Stk. 2. Heldur limur, at viðurskifti eru, sum kanska eru fevnd av stk. 1, so eigur viðkomandi, áðrenn málið verður viðgjørt í ráðnum, at greiða leiðaranum frá hesum.

Stk. 3. Ráðið avger endaliga, um limurin kann luttaka í viðgerðini og avgerðini í málinum. Í hesi viðgerð og avgerð luttekur viðkomandi ikki.

§ 6

Ráðslimur hevur tagnarskyldu um tær trúnaðarupplýsingar, sum kunnleiki fæst um sum limur í Dáturáðnum og hevur annars tagnarskyldu eftir vanligum reglum um málsviðgerð, galdandi innan almennu umsitingina. Sama tagnarskylda er galdandi fyri starvsfólk á Dátueftirlitinum, sum luttaka í málsviðgerð.

Stk. 2. Ráðslimur skal ansa eftir, at tilfar sum verður fingið í sambandi við hetta virksemið, ikki kemur óviðkomandi í hendi.

Stk. 3. Tá ið limur fer úr Dáturáðnum, skal tilfar, sum fingið er í starvinum, latast aftur til avgreiðsluskrivstovuna.

Dátueftirlitið, tann 27. aug. 2002.

# Skjal 2: Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003

– UM TRYGD Í SAMBANDI VIÐ VIÐGERÐ AV PERSÓNSUPPLÝSINGUM

Við heimild í § 31, stk. 7, í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum verður ásett:

## ØKI OG ENDAMÁL

§ 1. Kunngerðin er galdandi fyri heilt ella lutvíst elektroniska viðgerð av persónsupplýsingum fyri privat og fyri tað almenna, har tað er neyðugt, til tess at forða fyri missi av lívi og heilsu, fíggjarligum tapi ella missi av umdømi, persónliga frælsinum og heimafriðinum, at tryggja trúnað, atgongd til og heild í upplýsingunum. Har slíkur vandi er, skulu tey miðvísu og ætlaðu tiltøkini, sum verða sett í verk sambært hesi kunngerð, vera í mun til møguleikan fyri og avleiðingarnar av trygdarbroti.

## ÁLEGGINGAR FRÁ DÁTUEFTIRLITINUM

§ 2. Dátueftirlitið kann áleggja einum dátuábyrgdara at tryggja persónsupplýsingar og her áseta mørk fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

## TRYGDARLEIÐSLAN

§ 3. Tann, sum hevur dagligu leiðsluna í virkinum, stovninum o.ø. hjá dátuábyrgdaranum, hevur ábyrgdina av, at ásetingarnar í hesi kunngerð verða fylgdar.

Stk. 2. Trygdarmál skulu setast, har endamálið við viðgerðini av persónsupplýsingum skal lýsast, og somuleiðis skulu yvirskipaðar reglur fyri nýtslu av kunningartøkni lýsast.

Stk. 3. Í eini trygdarstrategi skulu raðfestingar og val í trygdararbeiðinum lýsast.

Stk. 4. Eftirmetingar skulu gerast minst eina ferð árliga fyri at meta um, um nýtslan av upplýsingakervinum er hóskandi samanborið við tørvin hjá virkinum, stovninum o.ø., og um trygdarstrategiin veitir nøktandi trygd.

Stk. 5. Úrslitið av eftirmetingunum skal skjalfestast og nýtast sum grundarlag, skulu møguligar broytingar gerast í trygdarmálum ella trygdarstrategi.

## VÁÐAMETING

§ 4. Yvirlit skal gerast yvir, hvørji sløg av persónsupplýsingum verða viðgjørd. Dátuábyrgdarin skal áseta mørk fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Stk. 2. Dátuábyrgdarin skal gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiði á sannlíkindum fyri broti á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av hesum.

Stk. 3. Verða broytingar gjørdar, sum hava týdning fyri trygdina, skal nýggj váðameting verða gjørd.

Stk. 4. Úrslitið av váðametingunum skal samanberast við ásettu mørkini fyri, hvørjir váðar kunnu góðtakast sbr. § 2.

Stk. 5. Úrslitið av metingunum skal skjalfestast.

## TRYGDARSKOÐAN

§ 5. Trygdarskoðan av nýtsluni av upplýsingakervinum skal gerast minst 1 ferð árliga. Skoðanin skal fevna um meting av fyriskipan, trygdartiltøkum og nýtslu av samskiftisfelagum og veitarum.

Stk. 2. Kemur fram í sambandi við skoðan av trygdini, at óætlað nýtsla er, skal hetta viðgerast sum frávik sbr. § 6.

Stk. 3. Úrslitið av skoðanini skal skjalfestast.

## FRÁVIK

§ 6. Trygdarbrot eins og nýtsla, sum ikki er í samsvar við skipaðar mannagongdir, vegleiðingar o.t., skal viðgerast sum frávik.

Stk. 2. Endamálið við viðgerð av frávikum eigur at vera at fáa vanligu viðgerðina av persónsupplýsingum í rætt lag aftur, rætta orsøkina til frávikið og forða fyri endurtøku.

Stk. 3. Eru trúnaðarupplýsingar útflýggjaðar orsakað av frávikinum, og hesar ikki eru loyvdar at útflýggja, skal Dátueftirlitið fráboðast.

Stk. 4. Viðgerð av frávikum skal skjalfestast.

## FYRISKIPAN

§ 7. Greiðar reglur um myndugleika- og ábyrgdarbýti skulu gerast fyri nýtslu av upplýsingakervinum.

Stk. 2. Myndugleika- og ábyrgdarbýti skal skjalfestast og skal ikki broytast uttan góðkenning frá leiðsluni hjá dátuábyrgdaranum.

Stk. 3. Upplýsingakervið skal byggjast soleiðis upp, at trygdin er nøktandi. Hvussu upplýsingarkervið er uppbygt skal skjalfestast og skal ikki broytast uttan góðkenning frá tí, sum hevur dagligu leiðsluna í virkinum, stovninum o.ø. hjá dátuábyrgdaranum.

Stk. 4. Nýtsla av upplýsingakervinum, sum hevur týdning fyri trygdina, skal verða sambært ásettum mannagongdum, vegleiðingum o.t.

## STARVSFÓLK

§ 8. Starvsfólk hjá dátuábyrgdara skulu bert nýta upplýsingakervið til tess at útinna álagdar uppgávur, og starvsfólkini skulu hava nýtslurættindi í sambandi við útinnan av neyðugum arbeiðsuppgávum.

Stk. 2. Starvsfólk skulu hava neyðugan førleika at nýta upplýsingakervið í samsvari við ásettar mannagongdir, vegleiðingar o.t.

Stk. 3. Nýtslurættindi til upplýsingakervið skulu skrásetast.

## TAGNARSKYLDA

§ 9. Har trúnaður er neyðugur, skulu starvsfólk hjá dátuábyrgdara hava tagnarskyldu. Tagnarskyldan fevnir eisini um aðra upplýsing av týdningi fyri trygdina.

## FYSISK TRYGD

§ 10. Trygdartiltøk skulu setast í verk fyri at forða

óviðkomandi í at fáa atgongd til útgerð, sum verður nýtt til viðgerð av persónsupplýsingum.

Stk. 2. Trygdartiltøkini skulu somuleiðis forða óviðkomandi í at fáa atgongd til aðra útgerð av týdningi fyri trygdina.

Stk. 3. Útgerð skal leggjast inn á tílíkan hátt, at ávirkan uttanífrá ikki fær týdning fyri viðgerð av persónsupplýsingum.

## TRYGGJAN AV TRÚNAÐARUPPLÝSINGUM

§ 11. Trygdartiltøk skulu setast í verk fyri at forða óviðkomandi í at fáa innlit í persónsupplýsingar, sum skulu viðgerast í trúnaði.

Stk. 2. Trygdartiltøk skulu somuleiðis forða óviðkomandi í at fáa innlit í aðrar upplýsingar av týdningi fyri trygdina.

Stk. 3. Persónsupplýsingar, sum verða fluttar elektroniskt við flutningsmiðlum uttan fyri fysiska eftirlitið hjá dátuábyrgdara, skulu bronglast ella tryggjast á annan hátt, um trúnaður er neyðugur.

Stk. 4. Fyri goymslumiðlar við persónsupplýsingum, har trúnaður er neyðugur, skal tørvurin á trúnaði síggjast t.d. við frámerki á miðlinum.

Stk. 5. Verður goymslumiðilin ikki longur nýttur til tílíkar upplýsingar, skulu upplýsingarnar strikast á goymslumiðlinum.

## TRYGGJAN AV ATGONGD

§ 12. Tiltøk skulu setast í verk fyri at tryggja, at atgongd er til persónsupplýsingar, sum skulu vera tøkar.

Stk. 2. Tiltøkini skulu somuleiðis tryggja atgongd til aðrar upplýsingar av týdningi fyri trygdina.

Stk. 3. Fæst ikki vanlig atgongd til upplýsingakervið, skulu aðrir møguleikar fyri viðgerð verða tøkir, soleiðis at neyðug nýtsla kann fara fram.

Stk. 4. Persónsupplýsingar og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at fáa nýtsluna í gongd aftur, skulu avritast.

## TRYGGJAN AV SONNUM UPPLÝSINGUM

§ 13. Tiltøk skulu setast í verk fyri at forða fyri, at broytingar verða gjørdar í persónsupplýsingum, har broytingar ikki eru loyvdar, og har heildin í upplýsingunum er neyðug fyri at tryggja, at upplýsingarnar eru sannar.

Stk. 2. Trygdartiltøkini skulu somuleiðis forða, at broytingar verða gjørdar í øðrum upplýsingum, har broytingar ikki eru loyvdar, og upplýsingarnar hava týdning fyri trygdina.

Stk. 3. Tiltøk skulu setast í verk at verja ímóti oyðileggjandi forritum.

## TILTØK Í SAMBANDI VIÐ IKKI LOYVDA NÝTSLU

§ 14. Trygdartiltøk skulu forða fyri ikki loyvdari nýtslu av upplýsingakervinum, og trygdartiltøk skulu gera tað møguligt at uppdaga slíkar royndir.

Stk. 2. Royndir uppá ikki loyvda nýtslu á upplýsingakervið skulu skrásetast.

Stk. 3. Trygdartiltøkini skulu fevna um tiltøk, sum starvsfólkini ikki kunnu fáa ávirkan á ella fara uttanum, og tiltøkini skulu ikki vera avmarkað til gerðir, sum hvør einstakur kann væntast at gera.

Stk. 4. Trygdartiltøkini skulu skjalfestast.

TRYGD Í SAMBANDI VIÐ SAMSKIFTI

§ 15. Dátuábyrgdari eigur bert at flyta persónsupplýsingar elektroniskt til tann, sum lýkur krøvini í hesi kunngerð.

Stk. 2. Dátuábyrgdari kann tó flyta persónsupplýsingar til tann, sum sambært lóg hevur heimild at krevja upplýsingar úr almennari skrá, ella um flutningurin hevur heimild í ásetingunum um flutning av persónsupplýsingum til útlond í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.

Stk. 3. Veitarar, sum seta í verk trygdartiltøk ella á annan hátt nýta upplýsingakervið vegna dátuábyrgdara, skulu lúka krøvini í hesi kunngerð.

Stk. 4. Dátuábyrgdari skal seta greið krøv til myndugleika- og ábyrgdarbýti hjá samskiftisfelagum og veitarum. Myndugleika- og ábyrgdarbýti skulu lýsast í serligari avtalu.

Stk. 5. Dátuábyrgdari skal kunna seg um trygdarstrategiirnar hjá samskiftisfelagum og veitarum og javnan tryggja sær, at hesar eru nøktandi.

SKJALFESTING

§ 16. Mannagongdir, vegleiðingar o.t í sambandi við nýtslu av upplýsingakervinum og aðrar upplýsingar av týdningi fyri trygdina, skulu skjalfestast.

Stk. 2. Skjalfestingin skal goymast í minsta lagi í 5 ár frá tí degi, at nýtt galdandi skjal kemur í staðin fyri gamla skjalið.

Stk. 3. Skráseting av nýtslu av upplýsingakervinum, sum er loyvd eins og skráseting av nýtslu, sum ikki er loyvd, skal goymast í minsta lagi í 12 mánaðir. Sama er galdandi fyri skráseting av øllum øðrum tilburðum av týdningi fyri trygdina.

GILDISKOMA

§ 17. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Upplýsingakervi, sum eru fevnd av lógini, skulu innan 1. september 2004 lúka treytirnar í hesi kunngerð.

Stk. 2. Dátueftirlitið kann í serligum føri geva loyvi til eina longri tillagingartíð enn nevnt í stk 1., tó í mesta lagi tvey ár, og bert um vísast kann á tilskilaða ætlan yvir, hvussu krøvini í kunngerðini væntandi verða lokin.

Løgmálaráðið, 27. februar 2003
Høgni Hoydal, (sign.)
landsstýrismaður

/Rúni Joensen, (sign.)


CONNECT